# Breiddarvenjing fyri U11 og U13

## KBF og BSF

bjóða hervið til breiddarvenjing fyri U11 og U13 - t.v.s. fyri børn fødd í 2009, 2008, 2007 og 2006. Venjingin verður í Badmintonhøllini í Klaksvík.

**Tíð og stað: Í Badmintonhøllini í Klaksvík leygardagin 5. januar 2019**

**U11 (fødd í 2008 og 2009) venja kl. 09.00 – 12.00**
**U13 (fødd í 2006 og 2007) venja kl. 13.00 – 16.00 (lið 1)**
**U13 (fødd í 2006 og 2007) venja kl. 17.00 – 20.00 (lið 2)**
**Møtt verður 10 min. áðrenn.**
**Tíðirnar eru vegleiðandi og kann broyting koma í.**

**Venjarar: Gunnva Jacobsen og Magnus Dal-Christiansen**

**Tilmelding:** Feløgini skulu senda samlaða tilmelding til kbf@kbf.fo

**í seinasta lagi sunnudagin 23. desember 2018**

Spælarar melda til egið felag, sum so sendir tilmeldingarnar víðari til kbf

Endamálið við breiddarvenjingini er at geva allari breiddini av føroyskum badmintonleikarum ein læruríkan og stuttligan venjingardag saman við tveimum evnaríkum badmintonvenjarum. Øll U11- og U13-børn kunnu melda til. Einasta kravið er, at tey eru limir í einum føroyskum badmintonfelag.

KBF & BSF